# Útbúgving og gransking

## Partur 1 - Útbúgving

### Ein frágreiðing í samband við Visjón 2015

## Strategibólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Fororð

Føroya Landsstýrið hevur stungið visjón 2015 út í kortið, har stevnumiðið er, at Føroyar um 10 ár skulu teljast millum heimsins fremstu tjóðir. Føroya løgmaður hevur í hesum sambandi heitt á vinnuna um at vera við í hesum arbeiði.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tí sett ein strategibólk til at viðgera búskaparlig viðurskiftir, sum hava týdning fyri at røkka hesum stevnumiði, og at koma við tilmælum til, hvussu ferð kemur á búskapin soleiðis, at føroyingar um 10 ár kunnu hava eins høgt livistøði og heimsins fremstu tjóðir.

Í strategibólkinum sita Jóhan Páll Joensen, Magni Arge, Egil Olsen, Marner Jacobsen, Kristoffur Laksá, Ólavur Gregersen, Jan Mortensen og Marita Rasmussen. Hans Jákup Mikkelsen hevur verið skrivari hjá bólkinum.

Ritið er onnur frágreiðing, sum strategibólkurin leggur úr hondum. Ritið viðger útbúgving og gransking. Ritið er í tveimum pørtum, fyrsti parturin viðgerð útbúgving og seinni parturin gransking og menning. Broytingar, sum bólkurin mælir til, skulu vera við til at røkka stevnumiðnum í 2015.

Tilmælini hava øktar almennar útreiðslur við sær, men tey eru eisini ein íløga í framtíðina, har føroyingar koma at skapa størri virðir. Onkrar metingar eru gjørdar av øktu útreiðslunum, men strategibólkurin hevur ikki sæð hetta sum sína uppgávu at greina. Heldur hevur bólkurin sæð tað sum sína uppgávu at koma við tilmælum til, hvussu føroyingar kunnu fáa hægri førleika og vitan.

Í kjalarvørrinum av einskiljingunum fær tað almenna stórar inntøkur, og hesar inntøkur kunnu fíggja allar tær broytingar, sum her verða tilmæltar. Sjálvsagt er tað ein raðfestingarspurningur, hvat peningurin frá einskiljungunum verður brúktur til, men strategibólkurin er av tí fatan, at ein góð nýtsla av parti av hesum peningi er at økja førleika borgarans. Peningurin verður sostatt ein íløga í humanan kapital, sum fer at kasta av sær yvir tíð.

# Innihald

**1. INNLEIÐING ...... 3**

1.1 FÝRA DRIV TIL VÆLSTAND ...... 4

1.2 GRUNDARLAGIÐ SKAL VERA ÍLAGI FYRST ...... 4

1.3 TÁ GRUNDARLAGIÐ ER ÍLAGI ...... 6

1.4 TVÆR LEIÐIR AT GANGA ...... 7

**2. ÚTBÚGVING ...... 8**

2.1 FØRLEIKI BORGARANS ...... 8

2.2 FÓLKASKÚLIN ...... 11

*2.2.1 Bygnaður í fólkaskúlanum ...... 11*

*2.2.2 Góðska ...... 12*

*2.2.3 KST-nýtsla ...... 14*

2.3 MIÐNÁMSSKÚLIN ...... 15

*2.3.1 Bygnaður í miðnámsskúlanum ...... 16*

*2.3.2 Eittans miðnámsprógv við valgreinum ...... 17*

*2.3.3 KST-nýtsla ...... 18*

*2.3.4 Íverksetaramenning ...... 19*

2.4 VÍÐARI ÚTBÚGVINGAR ...... 19

2.5 EFTIRÚTBÚGVING ...... 22

2.6 VITANARSTARVSFÓLK ...... 23

2.7 LÍVSLONG LÆRA ...... 24

2.8 MARGINALSKATTUR EIN FORÐING ...... 25

2.9 TILMÆLI ...... 26

**3. KELDUR ...... 29**

# Hugtakslýsing

<u>Kandidatútbúgving og masterútbúgving:</u> Í frágreiðingini verður ikki skilt ímillum kandidat- og masterútbúgving. Ein kanditatútbúgving verður í frágreiðingini viðgjørd sum ein masterútbúgving. Tá ið frágreiðingin viðger masterútbúgvingar, eru kandidatútbúgvingar íroknaðar.

## 1. Innleiðing

Orðið nýskapan hevur ofta verið á lofti seinastu tíðina í almenna kjakinum. Vit skulu hava nýskapan fyri at fáa størri búskaparvøkstur. Við hesari grundgeving hevur verið tosað um at økja granskingarorkuna frá almennari síðu – eitt nú at byggja eina granskingarpark.

Nýskapan viðførir, at vit kunnu fáa hægri livistøði, tí vit kunnu fáa meira fyri minni. Nýskapan er ein kappingarførari vøra, tænasta ella mannagongd, sum nøktar tørv borgarans betri og troytir avmarkaða tilfeingið betri. Orðið nýskapan er tó einki í sær sjálvum. Nýskapan er eitt úrslit av nøkrum viðurskiftum og nøkrum gerðum, sum fyrst skulu gjøgnumførast.

Danska vinnumálaráðið hevur við íblástri úr OECD sagt, hvat hevur týdning fyri at fáa nýskapan í einum samfelag. Hetta er víst í mynd 1 niðanfyri.

Mynd 1. FORA myndilin




Kelda: FORA, Innovationsmonitor, s. 9

## 1.1 Fýra driv til vælstand

Búskaparvøksturin í heiminum hevur verið bygdur á eina størri og betri nýtslu av arbeiðsmegi og kapitali. Men síðstu fimtan árini hevur ikki verið møguligt at givið hesari orsøk eina skyldina av tí stóra búskaparvøkstri, sum ávís lond hava verið fyri.[1]

OECD hevur hagfrøðiliga staðfest, at umframt eina betri tilfeingisnýtslu við virknari kapping og einum vælútbygdum undirstøðukervi eru fýra driv, sum skunda undir búskaparvøkstur. Tey eru hægri førleiki hjá borgarum, øking og útbreiðsla av vitan, størri tal av og vøkstur í nýggjum fyritøkum og størri nýtsla av kunningar- og samskiftistøkni (KST).

Hesi fýra drivini eru í mynd 1 omanfyri, nevniliga (i) vitanarstarvsfólk, (ii) vitan-arskapan og vitanarspjaðing, (iii) íverksetaravirksemi og (iv) nýtsla av kunningar- og samskiftistøkni. Frágreiðingin hjá OECD verður nevnd “ The new Economy – beyond the Hype”. Hon sigur, at ein nýggjur búskapur er skaptur, sum byggir á omanfyrinevndu driv og sum okkara grannalond – eitt nú Danmark – leggja stóran dent á at fremja.

## 1.2 Grundarlagið skal vera ílagi fyrst

Grundarlagið skal tó vera ílagið fyrst, og grundarlagið undir øllum búskapinum er, at tjóðin hevur ein stabilan búskaparpolitikk og ein greiðan bygnaðarpolitikk. Lág inflation, lág renta, stabilt gjaldoyra, høg uppsparing saman við einum tryggum fíggjarpolitikki er fyrsta treyt fyri búskaparvøkstri. Hetta viðførir ein tryggleika hjá fyritøkum og borgarum at virka í landinum.

Bygnaðarpolitikkurin skal eisini verða greiður. Hetta merkir, at frí og virkin kapping, sum tilskundar eina betri tilfeingisnýtslu, skal vera til staðar. Frí og virkin kapping skal vera galdandi á øllum marknaðum, og marknaðirnir eru kapital-, arbeiðs-, náttúrutilfeingis- og vøru- og tænastumarknaðurin. Allar vinnur

[1] Innovationmonitor 2004, s. 2

skulu viðgerast eins, og eingin serskipan skal tilskunda tilfeinginum inn í ávísar vinnur.

Samstundis skal undirstøðukervi vera vælútbygt. Vegir, havnir, brúgvar og tunnlar skulu vera útbygt, samstundis sum gott ferðasamband skal vera millum oyggjar og millum lond bæði loftvegis og sjóvegis. Tó er undirstøðukervi so mangt annað enn omanfyrinevndað. Tað umfatar eisini eitt gott skúlaverk og almanna- og heilsuverk. Fevnt av undirstøðukervinum er harafturat eitt vælútbygt kervi bæði viðvíkjandi samskifti, fígging og orku.

Opinleiki skal vera um landamørk, soleiðis at tey fýra frælsini kunnu flyta frítt. Opinleiki trýstir arbeiðsmarknaðin at vera liðiligan. Hetta merkir, at arbeiðsmarknaðurin inniheldur flytføra arbeiðsmegi, sum kann tillaga seg allar broytingar uttaneftir. Borgarin fær við hesum frælsi at virka og verður eggjaður at nema sær útbúgving.

Arbeiðstakarar, sum missa sítt arbeiði, skulu hava hjálp til at finna nýggj arbeiðspláss og til at fáa sær nýggja útbúgving. Hinvegin skal orkan ikki brúkast til at varðveita tey arbeiðspláss, sum eftir røttum eiga vera niðurløgd, tí tey ikki eru produktiv.

Vælvirkandi marknaðir, sum eggja til kapping, hava við sær størri nýskapan og ígongdsetaravirksemi. Trupulleikin í hesum er, at politiski myndugleikin í flestu londum, eisini í Føroyum, brúkar almenna stýring til at áseta, hvør er á marknaðinum og er við til prísáseting í ávísum vinnum. Politisku myndugleikarnir í ymsu londunum eru samdir um, at frí kapping er av tí góða, og at almenn stýring skal burtur. Tó sær tað út til at vera sera trupult at gjøgnumføra hesa semjuna, tí politiska skipanin hevur ikki dirvi til tess. Orsøkin her í Føroyum er allarhelst hon, at avgerðirnar ikki eru vælkomnar og raka ávísar samfelagsbólkar og sláa eisini hart niður á ta maktjavnvág, sum er í Føroyum í dag.

### 1.3 Tá grundarlagið er ílagi

Tá ið stabilitets- og bygnaðarpolitikkurin saman við einum góðum undirstøðukervi eru ílagi, er møguligt at flyta seg upp eftir mynd 1. Fyrsta drivið, sum skal vera ílagi, áðrenn farið verður víðari, er eitt væl skúlað fólk.

Frí og virkin kapping eggjar fyritøkum at seta starvsfólk við høgum førleika í starv fyri at klára seg í kappingini, og kappingin eggjar eisini fyritøkum at granska ella menna fyri at skapa sær meira vitan enn kappingarneytin. Avleiðingin er, at fólk verða eggjað at fáa sær útbúgving. Almenna uppgávan er at bjóða góðar útbúgvingar fram og eggja føroyingum at fara undir lestur. Við hesum fáa Føroyar vitanarstarvsfólk, sum hava góð evnir og hollan førleika, og sum eru grundarsteinurin undir nýskapanini.

Síðani eru trý driv, sum dentur verður lagdur á. Nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni skal stimbrast, og góð og bílig útbreiðsla skal vera av henni. Undirstøðukervið av KST skal vera gott, og borgarar í samfelagnum skulu verða stimbraðir at brúka KST í skúla, í arbeiði og heima.

Næsta drivið er íverksetanarvirksemi, sum er við til at økja um nýskapanina og kappingina. Íverksetanarvirksemi skal stimbrast, sum greitt er frá í frágreiðingini um kapitalmarknaðin.

Triðja drivið er vitanarskapan og -spjaðing. Vitan skal vera skapt ella funnin og síðani breidd út soleiðis, at hon kann takast í brúk. Vitan verður skapt við gransking og menning, men hon kann eisini verða drigin aðrastaðni frá við at eftirlíkna onnur. Vitanin verður spjadd í búskapinum við at hava starvsfólk við høgum førleika, sum hava evnir til at svølgja vitan, og við at hava virkna kapping um arbeiðsmegina.

Fyri at kunna heysta av vitanarstarvsfólkunum og teimum trimum drivunum er neyðugt at hava eina leiðslu og ein bygnað í fyritøkuni, sum megna tað. Leiðslan skal hava førleika til at gagnnýta vitanarstarvsfólk, og virkisbygnaðurin skal vera

liðiligur. Hetta samanlagt kann sostatt føra til nýskapan og hægri produktivitet, sum í síðsta enda økir um vælstandin.

Í hesum riti verða vitanarstarvsfólk viðgjørd, sum tað mest grunnleggjandi, og síðani tað eina drivi um vitanarskapan og spjaðing – ella øking og útbreiðsla av vitan. Granskingarparkin, sum hevur verið nógv umrødd í seinastuni, er ein partur av hesum drivi.

## 1.4 Tvær leiðir at ganga

Tvær gongdar leiðir eru, til at Føroyar skulu mennast á hesum øki. Onnur er at føroyingar herma eftir øðrum og taka nýggja tøkni í brúk. Hin er, at Føroyar granska. Tó í báðum førum er neyðugt, at føroyingar hava so holla útbúgving sum gjørligt.

Í fyrra lagi er neyðugt við útbúgving fyri at kunna herma eftir øðrum, og í seinna lagi er neyðugt við útbúgving fyri at hava førleika til at granska ella at leiða eina granskingarverkætlan. Tað, sum hevur alstóran týdning, er, at føroyingar útbúgva seg.

Strategibólkurin hevur valt at býta hesa frágreiðing í tveir partar, og geva hesar út hvør fyri seg. Í parti 1 í hesum riti verður útbúgving viðgjørd. Í parti 2, sum kemur út í januar 2006, verður gransking og menning viðgjørd.

# 2. Útbúgving

## 2.1 Førleiki borgarans

Føroyingar vita ikki, hvussu útbúgvingarstøðið er í Føroyum. Tað er ikki kortlagt enn, men vónandi verður tað gjørt sum skjótast, soleiðis at vit fáa vitan um vit eru før fyri at flyta tjóðina inn í vitanarsamfelagið, so sum altjóðagerðin trýstir okkum til.

Búskaparráðið[2] hevur í sínari seinastu frágreiðing víst, at føroyingar brúka minni av fíggjarligari orku til fólka- og miðnámsútbúgvingar, og at útbúgvingartíttleikin í Føroyum er væl lægri fyri 10 – 24 ára gomul enn í grannalondum okkara. Hetta eru ábendingar, sum vísa á, at føroyingar ikki eru eins væl skúlaðir og grannar okkara.

Vit vita ikki, hvussu útbúgvingarstøðið er í Føroyum, ella hvørjar førleikar føroyingar hava. Mett verður tó, at ein stórur partur av sjómonnunum, sum ikki eru yvirmenn, eru ófaklærdir. Eisini verður mett, at ein stórur partur av starvsfólkunum á flaka- og kryvjivirkjum eru ófaklærd. Umframt hetta eru ófaklærd fólk innan aðrar vinnur á landi.

Altjóðagerðin viðførir greiðari arbeiðsbýti millum lond. Fyri Føroyar merkir hetta ógvuliga sannlíkt, at arbeiðspláss fara at verða útveitt. Um útflutningsfyritøkurnar skulu megna at standa seg á altjóða marknaðinum er neyðugt, at tær eru kappingarførar. Útveiting til láglønarlond er tí kanska ein fyritreyt fyri at vera við. Útveiting stimbrar kappingarførið og møguleikarnar at yvirliva hjá føroyskum fyritøkum. Kanningar hjá Dansk Industri[3] vísa, at tílíkar fyritøkur økja um vitanartung starvspláss heima samstundis sum søla og vinningur økist.

---

[2] Búskaparráðið. Tøknilig Menning 2005

[3] Hans Skov Kristensen. Framløga á Vinnudegnum 2005

Fyri at megna at troyta alheimsgerðina til fulnar er neyðugt at hava ein liðiligan arbeiðsmarknað og eina vælútbúnað arbeiðsmegi. Á henda hátt kann arbeiðsmegin til allar tíðir flyta seg úr minni lønandi yvir í meiri lønandi arbeiðspláss. Føroyar hava hinvegin last seg fastar í einum gomlum og stirvnum vinnubygnaði, sum ger, at vit eru fátækari enn vit áttu at verið. Arbeiðsmegin í okkara høvuðsvinnu er fyri tað mesta ófaklærd, og óiva eru væl fleiri fólk enn neyðugt knýtt at høvuðsvinnuni orsaka av serskipanum sum fiskavirkisskipanini, minstuløn og skattalætta.

Tá ið dynamikkur kemur í eftir einskiljingarnar, er hugsandi, at fyritøkur fara at framleiða fisk í láglønarlondum. Samstundis er hugsandi, at fiskavirkir fara at leggja seg meira og meira eftir at fáa tøkni inn á virkini fyri at avloysa tí lutfalsliga dýru arbeiðsmegina.

Um umsetiligheitin verður størri millum skipabólkar, fækkast talið av skipum og brúk verður fyri væl færri sjómonnum. Sostatt er ikki óhugsandi at vit kunnu fáa lutfalsliga stórt arbeiðsloysi innan ófaklærd fólk í Føroyum. Hetta treytar tí, at ófaklærd fólk fáa tilboð um skúlagongd.

Áðrenn hesir borgarar kunnu koma inn í vitanarsamfelagið skulu tey í læru ella í trý ára miðnámsútbúgving og í eina 2 til 3 ára høga útbúgving. Sostatt tekur tað seks ár at umskúla verandi arbeiðsmegi, og tí er neyðugt at farið verður í gongd beinanvegin.

Eitt tilmæli kundi tí verið, at ein partur av tí peningi, sum tað almenna fær fyri einskildu fyritøkurnar, verður brúktur til at útbúgva verandi ófaklærdu arbeiðsmegina. Øll tilkomin ófaklærd skulu fáa ókeypis tilboð at fara á miðnámsskúla, í læru ella í aðra viðkomandi útbúgving við stuðli frá tí almenna.

Um ikki hesin leisturin verður fylgdur, er lætt at ímynda sær, at tá ið nøgdin av størvum til ófaklærd minka og hesi gerast arbeiðsleys, fara løgtingslimir at arbeiða fyri at seta forðingar fyri, at fiskur kann fara óviðgjørdur av landinum fyri at verja føroysk ófaklærd arbeiðspláss. Hetta viðførir at vinnan ikki líka skjótt tillagar seg til ein nýggjan veruleika og vandi er fyri at vit binda føroyska

borgaran í einari framleiðslu uttan framtíð. Og á henda hátt koma vit ikki at røkka visjónini um 10 ár.

Í fyrstalagi fara vit at halda lønarlagnum niðri í Føroyum, tí tað ikki verður pláss fyri nøkrun lønarvøkstri vegna hørðu altjóða kappingina. Í øðrum lagi er vandi fyri at vit aftur fara at umrøða at geva stuðul fyri at hava virkini í gongd, tí tey ikki eru kappingarfør við verandi lønum. Tað sum hetta viðførir er, at lønin á hesum partinum av arbeiðsmegini ikki kann hækka sum hjá øðrum, og at avkastið av kapitalinum í høvuðsvinnuni verður millum lítið og einki. Sostatt eru tveir taparar – arbeiðsmegin og kapitalurin - til skaða fyri livistøðið í landinum.

Betri er, at hesar fyritøkur longu nú byrja at tillaga sína framleiðslu, og hetta kemur at merkja minni nøgd av ófaglærdum arbeiði. Sostatt er einasta loysn at útbúgva arbeiðaran.

Frí og virkin kapping á øllum økjum og ein opin búskapur mótvegis útheiminum vil viðføra, at føroyski borgarin byrjar at kenna eitt trýst til at økja sín førleika og sína vitan bert fyri at vera við, tí flytføri á arbeiðsmarknaðinum verður stórt og krøvini til starvsfólk fara at hækka.

Útbúgving er tí vegurin til eitt gott starv og høga løn. Kanningar hjá OECD vísa, at lønargjógvin millum lærd fólk og tey við lágum førleika bara veksur[4]. Ístaðin fyri at royna at minka gjónna, sum formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag ofta hevur verið inni á, skulu vit heldur eggja borgarum at taka sær eina útbúgving og við tí røkka einari hægri løn.

Samanumtikið kann sigast, at vit eru eftirbátar á útbúgvingarøkinum, og tí skulu vit bæði økja um talið av ungum, ið fara undir lestur, og fáa tilkomnu føroyingarnar undir lestur.

Uppgávan hjá okkara útbúgvingarskipan er tvíbýtt. Fyrra er, at flest møguligir borgarar fáa útbúgving, og seinna er, at góðskan á útbúgvingarskipanini skal vera so góð sum gjørligt. Talið av lesandi skal økjast og góðskan á skúlanum skal

[4] OECD: The New Economy, s. 55

økjast. Skúlarnir, sum vera umrøddir, eru fólkaskúlin, miðnámsskúlin og hægri lestur.

## 2.2 Fólkaskúlin

Fólkaskúlin er tvungin, og tí er talið av næmingum í fólkaskúlanum eins høgt og í øðrum londum. Spurningurin, sum settur kann vera, er, um bygnaðurin av fólkaskúlanum er nóg góður, um góðskan í fólkaskúlanum er nóg høg, og um fólkaskúlin verður tilskundaður til at betra um góðskuna.

### *2.2.1 Bygnaður í fólkaskúlanum*

Talið av fólkaskúlum í Føroyum er 58, sum kann metast at vera eitt høgt tal. Nógvir smáir bygdaskúlar eru, har talið av bæði næmingum og lærarum er lágt. 19 skúlar hava bert ein lærara, og 40 skúlar hava færri enn 10 lærarar. Bert 14 skúlar eru við fleiri enn 20 lærarum. Tilsamans eru áleið 620 lærarar í starvi í Føroyum, og talið av næmingum er 7.700. Sostatt eru 12 næmingar fyri hvønn lærara. Framhaldsdeildirnar eru 18 í tali[5].

Bygnaðurin kann vera ein forðing fyri menning av góðskuni. Skipanin við teimum lítlu bygdaskúlunum er meira av sosialum týdningi fyri bygdasamfelagið, enn tað er fyri at menna næmingin. Talið av lærarum í smáu bygdaskúlunum er lágt, og vitanarumhvørvið og vitanarmenningin er tí ikki eins góð, sum á einum størri skúla. Hinvegin eru 16 skúlar við einum næmingatalið hægri enn 200. Hetta svarar til tríggjar fjóðringar av næmingatalinum í Føroyum. Sostatt kann eisini sigast, at ein stórur partur av næmingunum er í einum nóg stórum umhvørvi.

Fyri at røkka einum vitanarsamfelag er neyðugt, at førleiki næmingsins verður settur í hásæti og ikki verður settur til viks av øðrum sosialum viðurskiftum. Ein stórur fólkaskúli í føroyskum høpi við bæði barnaskúla og framhaldsdeild hevur størri tal av lærarum, sum gevur ein størri og breiðari førleika og viðførir størri orku til at menna og skipa undirvísingina. Størri tal av næmingum gevur

[5] Kelda: Lærarafelagið, Rálegging fólkaskúlans 2004-2005, MMR

næmingum betri møguleika at læra av hvørjum øðrum, læra at arbeiða í toymum og at samskifta. Eisini verður størri kapping millum næmingar, og breiða umhvørvið gevur betri umstøður til at framelva framúr góðar næmingar[6].

Ein góður spurningur er, hvussu nógvir lærarar skulu vera fyri at hava eitt gott og mennandi lærarumhvørvi, og hvussu fjølbroytt skal lærarumhvørvið verða fyri at skapa teir bestu skúlarnar?

Um vit t.d. áseta, at í minstalagi 20 lærarar skulu vera á hvørjum skúla, vil tað siga, at talið av skúlum skal skerast við einari helvt. Við hesum verður tann lítli bygdaskúlin niðurlagdur. Hetta skundar sjálvsagt undir, at smáu plássini í Føroyum verða avtoftað. Skulu føroyingar hava eins høgt livistøði og grannarnir, er tíverri neyðugt, at brotið verður við bygdamenning og útjaðarapolitikk, og ístaðin skal førleiki og framleidni setast í hásæti. Hetta vil viðføra eina miðsavnan, har fólkatalið í miðstaðarøkinum hækkar.

Ein grundgeving fyri at varðveita teir smáu bygdaskúlarnar, er, at barnið trívist best í sínum heimliga umhvørvi, har tað eisini skal nema sær kunnleikan. Tilber at taka hædd fyri hesum, soleiðis at bygdaskúlarnir vera varðveittir fyri børn frá fyrsta til og við t.d. fimta flokk. Við hesum ber til at hava størri skúlar fyri børn í sætta flokki og eldri, har skúlarnir vera færri og størri við væl betri førleika. Frá sætta flokki verður sostatt førleiki næmingsins settur í hásæti, meðan fyri næming yngri enn hetta verður hædd tikið fyri sosialu viðurskiftum hansara.

### *2.2.2 Góðska*

Ein háttur at meta um góðskuna er at samanbera føroyska fólkaskúlan við aðrar fólkaskúlar og harvið staðfesta leguna og samstundis økja um kappingina millum lond. Í hesum sambandi er Mentamálaráðið farið í holt við PISA-kanningar, sum meta um førleikan hjá næmingum í nígginda flokki. Kappingin, sum kemur í av hesari kanning, eggjar politiska myndugleikanum og fólkaskúlunum at betra um

[6] Kelda: Sámal í Skorðini, rektari. Samrøða við útvarpið

skúlan. Education at a Glance-kanningar eru eisini ein møguleiki, har allir liðir í undirvísingarverkinum verða kannaðir.

Eisini kann kappingin millum fólkaskúlar í Føroyum økja um dygdina av skúlunum. Siðvenjan at samanbera avrik er ikki til staðar, og ein ávísur ótti er ímillum lærarar hesum viðvíkjandi. Um miðalkarakterir fyri føroyskar fólkaskúlar verða almannakunngjørdir, hevur tað við sær, at føroyskir skúlar fara at kappast og við tí fáa eina tilskundan um at betra undirvísingina.

Vandin við at samanbera skúlar er, at ein skúli bert fer at leggja dent á tey viðurskiftini, sum kappast verður um. Sostatt kann avleiðingin vera, at fjølbroytta undirvísingin fellir niðurfyri. Skipanin verður stirvin og fer at ganga út yvir nýhugsan.

Royndir í Bretlandi vísa, at ein skipan við almennum karakterum økir um spjaðingina av karakterunum ímillum skúlarnar, tí teir góðu næmingarnir vera fluttir úr teimum vánaligu skúlunum yvir í teir góðu skúlarnar. Trupulleikin við einari tílíkari skipan er eisini, at ein karakterur sigur meira um, hvussu foreldrini og sosiali arvurin er enn um góðskuna av undirvísingini[7].

Læraragóðskan er ein vaksandi trupulleiki í OECD-londum. Læraragóðskan hevur týdning fyri, hvussu væl næmingar klára seg. Frálæran í fólkaskúlanum er bygd á førleika lærarans, og trupulleikin liggur í, at skúlar hava torført við at seta lærarar við høgum førleika í starv. Lærarar hava vanliga ikki eina høga útbúgving, og í Føroyum er læraraútbúgvingin heldur ikki góðkend sum ein bachelor- ella masterútbúgving. Ein partur (6%)[8] av lærarunum í Føroyum er ófaklærdur, men tilgongdin er góð, og væntandi verður hesin trupulleikin loystur longu næsta ár.

Finnland hevur eitt vælvirkandi skúlaverk, og tað merkisverdað er, at Finnland niðurlegði læraraútbúgvingina fyri 30 árum síðani. Eftir tað hevur lærara-

[7] Det økonomiske råd: Dansk økonomi efterår 2003. s. 9

[8] MMR

útbúgvingin verið ein fimm ára universitetsútbúgving, sum eisini hýsir gransking innan námsfrøði. Útbúgvingin er býtt upp í ymsar bólkar eitt nú barnagarðs-lærarar, flokslærarar og greinlærarar. Sera vælumtókt er flokslæraraútbúgvingin í Finnlandi. Bert 10% av umsøkjarunum verða upptiknir. Hetta viðførir, at hesir lærarar eru høgt motiveraðir og hava høgan akademiskan førleika.

Lærarar, sum undirvísa í Finnlandi, hava master útbúgving. Teir, sum undirvísa úr sætta flokki og eldri, skulu eisini hava eina eitt ára masterútbúgving í námsfrøði. Vanliga undirvísa greinlærarar, sum hava serkunnleika innan tvær greinar, frá sætta flokki og eldri. Hesir kunnu eisini undirvísa á miðnámsskúlum[9].

Fyri at menna læraraútbúgvingina í Føroyum er allarhelst neyðugt, at hon verður umskipað til bachelor- og masterútbúgving. Eisini er neyðugt at samanbera føroyska læraraskúlan við aðrar skúlar fyri at staðfesta góðskuna á føroyska læraraskúlanum.

### *2.2.3 KST-nýtsla*

Miðalaldurin hjá lærarum hevur ávirkan á skúlan, tí eldri lærarar hava torført við at nýta nýggja tøkni í undirvísingini. Sum víst á frammanfyri, er tað eitt nú avgerandi fyri høgan búskaparvøkstur, at næmingar hava høgan førleika innan KST-nýtslu. Um lærarar ikki brúka hesi amboð í undirvísingini, vilja næmingarnir vera eftirbátar í mun til javnaldrarnar í øðrum londum.

Áleið 1.200 teldur eru í føroysku fólkaskúlunum. Hetta svarar til, at seks næmingar eru um hvørja teldu, og er tað eitt ov høgt tal av næmingum. Málið eigur at vera, at ein telda er til hvønn næmingin. Ringast stendur til í høvuðsstaðarøkinum, har 13 næmingar eru um hvørja teldu á Eysturskúlanum og í Argja skúla. Í Hoyvík eru 11 næmingar, somuleiðis í Tofta skúla eru 11 næmingar um hvørja teldu. Ábendingar eru eisini um, at teldurnar, sum eru á fólkaskúlunum í Føroyum, eru ótíðarhóskandi og rigga illa.

[9] FORA: Et benchmarkstudie af menneskelige ressourcer okt 2004, s. 56

Hugburðurin hjá fólkaskúlalærarum kann vera ein forðing, tí ein partur av teimum ber ótta fyri, at útgerðin ikki riggar, sum hon skal, og tí frávelja teir at brúka teldur í undirvísingini[10]. Hetta eru ábendingar, sum vísa, at fólkaskúlalærarar ikki eru búnir til at flyta samfelagið inn í nýggju øldina.

Ójøvn atgongd til nýggja tøkni og lærdómurin at brúka tøknina gevur ójavnað millum fólk. Tey, sum ikki eru við, detta burtur ímillum og hava ikki sama møguleika at vera partur av búskapinum. Tað viðførir eina størri spjaðing í inntøku millum sosialar bólkar í samfelagnum.

Føroyingar skulu hava so góða atgongd til kunningar- og samskiftistøkni sum einaferð gjørligt, og tí hevur tað alstóran týdning, at tøknin verður útbreidd í Føroyum. Hon skal brúkast á arbeiðsplássum, í skúlum og heima. Um útbreiðslan heima var á høgum støði, hevði tað beinanvegin lagt eitt trýst á KST-nýtslu í skúlunum. Ein háttur at økja um KST-nýtsluna í skúlunum er, at foreldur næminganna kunnu fáa ókeypis teldu, breiðband og internetnýtslu frá sínum arbeiðsgevara – bæði almennum og privatum – uttan at rinda skatt av gávuni.

## 2.3 Miðnámsskúlin

Tað hevur týdning fyri framleidni og flytføri hjá arbeiðsmegini, at hon nemur sær útbúgving, og tí hevur tað týdning, at so mong sum gjørligt fara á miðnámsskúlar ella í læru.

Fyri at vera flytfør og framleiðin er neyðugt, at ung fólk eru vápnað við í minstalagið einari miðnámsútbúgving. Í mongum OECD londum er tað so, at fimti hvør næmingur bert hevur fólkaskúlan og uttan nakran annan førleika, sum arbeiðsmarknaðurin virðissetir. Í okkara grannalondum stendur eitt sindur betri til. Sætti til tíggindi hvør næmingur gjøgnumførir bert fólkaskúlan[11].

---

[10] Mentamálaráðið.

[11] OECD. Education at Glance 2005 s. 10.

Sosialur arvur hevur týdning fyri útbúgvingarstøðið. OECD vísir á, at færri ung við ófaglærdum foreldrum velja at fara á miðnámsskúla. Spurningurin er, hvussu politiski myndugleikin kann mótarbeiða tí sosiala arvinum. Ein háttur er at tvinga næmingar eftir loknan fólkaskúla at fara á miðnámsskúla ella í læru.

Endamálið við miðnámsskúlanum er at fyrireika næmingar at fara undir hægri lestur. Uppgávan hjá landsstýrinum er at betra góðskuna av miðnámsskúlanum og at eggja næmingum at fara á miðnámsskúla beint eftir loknan fólkaskúla. Kanningar í øðrum londum vísa, at næmingar, sum fara út á arbeiðsmarknaðin hava torførari við at fara á víðari skúla. Ein háttur at mótarbeiða hesum er at nokta tannáringum at fara út á arbeiðsmarknaðin, fyrr enn teir antin hava lokið miðnámsprógv ella fýra ára læru.

### *2.3.1 Bygnaður í miðnámsskúlanum*

Tað er skilagott at savna ábyrgdina av útbúgvingini til ung í einum miðnámsskúla, sum kann geva næmingum fjøltáttaðan møguleika til at samanseta sína útbúgving. Eisini verður størri førleiki og vitan savnað á einum stað, har læraraumhvørvið kann økja um dygdina av undirvísingini. Eitt tílíkt umhvørvi kann harafturat draga lærarar við høgum førleika at sær. Í dag hava vit fleiri miðnámsskúlar og yvirlit eru í talvu 1 niðanfyri.

Talva 1. Miðnámsskúlar í Føroyum

| Skúli | Stað |
|---|---|
| Føroya Studentaskúli og HF-skeið | Tórshavn |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið | Kambsdalur |
| Miðnámsskúlin | Vágur |
| Klaksvíkar HF-skeið | Klaksvík |
| Føroya Handilsskúli | Tórshavn |
| Føroya Handilsskúli | Kambsdalur |
| Tekniski Skúlin | Tórshavn |
| Tekniski skúlin | Klaksvík |
| Fiskivinnuskúlin | Vestmanna |

Kelda: Mentamálaráðið

Tað eru sostatt níggju miðnámsskúlar – tríggir í Tórshavn, tveir í Klaksvík, tveir á Kambsdali, ein í Vági og ein í Vestmanna.

Trupulleikin við at hava eitt so stórt tal av skúlum er, sum við fólkaskúlanum, at læraraumhvørvið ikki er eins gott, sum tá stór og breið vitan er savnað á einum stað. Í størri skúlum er møguleiki fyri at fáa størri læraraførleika samstundis við, at næmingar kunnu fáa atgongd til høga breiða vitan. Størri skúlar hava eisini møguleika til at nøkta tørv næminganna betri við at kunna bjóða eina viftu av greinum út. Eisini fæst meira fyri minni, tí ein synergieffekt kemur í, tá skúlar vera miðsavnaðir.

Sostatt er skilabest, at bert ein miðnámsskúli verður í Havn og ein á Kambsdali. Allir hinir miðnámsskúlarnir eiga at vera niðurlagdir og fluttir inn í hesar tveir skúlarnar.

### *2.3.2 Eittans miðnámsprógv við valgreinum*

Eingin orsøk er at hava fleiri ymsar miðnámsskúlar fyri at kunna veita eina breiða viftu av útbúgvingartilboðum. Føroyska samfelagið er pinkulítið, og tí er ikki orka í sama mun at hava somu útbúgvingarskipanir sum eitt nú í Danmark. Miðnáms-útbúgvingarnar í Føroyum eru fyri tað mesta eitt avrit av donsku skipanini. Av tí at miðnámsskúlarnir eru so spjaddir, eru næmingar í dag, sum ikki fáa sín tørv nøktaðan, tí at undirtøkan til ávísar greinar er ov lítil til, at hon kann verða framd. Á ávísum skúlum er kravið, at í minstalagi 7 næmingar skulu vera fyri at kunna fremja eina undirvísing. Tað er sera spell fyri hesar næmingar.

Eisini undirvísa hesir skúlar hvør í sínum lagi í somu greinum so sum í føroyskum, støddfrøði og enskum. Skilabetri hevði verið at savna hesa undirvísingina.

Sum nevnt omanfyri, er ein háttur at fingið ein betri skúla fyri næmingarnar og ein rationellari skúla fyri skattgjaldaran at miðsavna miðnámsskúlar í ein depil á Kambsdali og ein í Marknagili í Havn.

Á hesum skúla skal verður eittans prógv – nevniliga eitt miðnámsprógv – eins fyri allar næmingar, sum verður sett í staðin fyri eitt students-, HF-, HT-, HIF- ella HH-prógv. Hesir næmingar skulu hava felags undirvísing í teimum vanligu kravdu lærugreinunum. Síðani skulu teir velja sær serstakar greinar, sum teir ynskja. Størri møguleiki er fyri at fáa júst ta greinina, sum næmingar ynskja, tí talið av næmingum er stórt. Hesar greinar kundu verði flokkaðar, sum víst í talvu 2 niðanfyri.

Talva 2. Dømi um sergreinar á miðnámsskúlanum

| | |
|---|---|
| Náttúruvísind | Fiskivinna |
| Tøkni | Samfelag |
| Kreativitetur | Mál |
| Búskapur | Sjófart |

Møguleiki skal vera fyri at samansjóða ymsar greinar, soleiðis at tað nøktar júst tørv næmingsins. Tað, sum í hesum sambandinum hevur alstóran týdning, er, at næmingurin fær at vita, hvørjar hægri útbúgvingar, hann fær atgongd til, og hvørjar hann verður avskorin frá við vali sínum.

Eisini vil hetta stóra umhvørvið stimbra sínámillum førleikarnar hjá næmingum, soleiðis at framúrgóðir næmingar vilja spretta burtur úr tí.

Góðskan á miðnámsskúlanum skal líka sum við fólkaskúlanum eftirmetast við at samanbera hann við skúlar í øðrum londum.

### *2.3.3 KST-nýtsla*

Ein næmingur í dag kann ikki eftir loknað miðnámsútbúgving banka upp á dyrnar hjá einum arbeiðsgevara, uttan at hann dugir at ferðast runt á einari teldu og duga bæði samskifti, tekstviðgerð og rokniark. Heldur ikki kann hann fara á ein hægri skúla uttan hendan førleikan.

Tað skuldi tí verði tvungið, at allir næmingar á miðnámsskúlanum fyrsta skúladag høvdu hvør sína farteldu við øllum hentleikum, og at allir skúlar høvdu tráleyst net. Alt pensum skuldi verði á netinum, og allar uppgávur skuldu verði gjørdar á teldu og avleverast elektroniskt. Ein treyt er eisini, at allir næmingar duga blindskrift.

### *2.3.4 Íverksetaramenning*

Íverksetaramenning er viðgjørd í øðrum sambandi og er eitt týdningarmikið driv fyri búskaparvøkstri. Miðnámsskúlar í Føroyum hava seinnu árini luttikið í European Business Game. Føroyingar hava staðið seg væl í hesari kapping, tó er lítið rúm fyri tiltakinum á miðnámsskúlunum, har bert Fiskivinnuskúlin tekur tiltakið í nóg stórum álvara.

Føroya Handilsskúli skipar eisini á hvørjum ári fyri íverksetaratiltakinum Ungt Virki, har næmingarnir stovna eina minni fyritøku og framleiða eina vøru. Spurningurin er, um íverksetaramenning ikki skal vera tvungin partur av undirvísingini á miðnámsskúlum.

## 2.4 Víðari útbúgvingar

So nógv sum gjørligt skulu fara undir hægri lestur, tí flytføri og framleidni hjá arbeiðsmegini økist við hesum. Næstan annar hvør borgari í Finnlandi og meira enn triði hvør borgari í hinum grannalondunum tekur eina hægri útbúgving. Vit vita ikki, hvat talið er í Føroyum, men málsetningurin kundi verði, at annar hvør føroyingur fer undir hægri lestur.

Hvíldarár økir um fráfallið fyri hægri lestur[12]. Hetta undirstrikar, at tað hevur týdning at byrjað verður uppá hægri lestur beinanvegin eftir miðnámsprógv. Stuðul at eggja skjóta yvirgongd frá miðnám til hægri lestur kann økja um talið á teimum sum ikki fáa sær hvíldarár. Samfelagsliga avkastið av einari útbúgving er størri, yngri borgarin er, tí hann kann sostatt virka fleiri ár á arbeiðsmarknaðinum

[12] Dansk Økonomi efterår 2003 s. 10

við sínum førleika. Tað er bíligari at útbúgva fólk skjótt, bæði tí, at skúlin er styttri og kostar minni, og tí at fólk koma fyrr út á arbeiðsmarknaðinum við høgari útbúgving og vera tí produktivari fyrr í lívinum.

Næmingar skulu sjálvi velja sær útbúgving, tí tey er best at meta um, hvat tey ætla sær í framtíðini. Frítt val av útbúgving krevur smidligar skúlar og smidligar útbúgvingarstovnar. Um tað fría vali skal vera ein samfelagsligur fyrimunur er neyðugt, at útbúgvingin er breið soleiðis, at útbúgvingin kann brúkast breitt á arbeiðsmarknaðinum. Hetta ger arbeiðsmegina flytførari.

Hetta merkir, at tær útbúgvingar, sum lesandi kunnu velja, mugu geva atgongd til aðrar útbúgvingar. Allar útbúgvingar skulu tí vera góðkendar, og týdningarmikið er, at tað ikki ber til at velja eina útbúgving, sum er ein blindgøta. Enda tey lesandi á einari blindgøtu, mugu tey byrjað av nýggjum. Sostatt er neyðugt, at allar útbúgvingar geva møguleikar til at fara á aðrar skúlar ella í aðrar vinnur, um tey ynskja at skifta karrieru. Skilabest er tí, at allar høgar útbúgvingar eru antin bachelor ella master útbúgvingar.

Metast skal um, hvussu javnvágin ímillum breidd og spesialisering í einari útbúgving skal vera. Næmingar skulu kunna meta um møguligar framtíðar avleiðingar av at velja ymsar útbúgvingar og vera smidlig á arbeiðsmarknaðinum eftir loknað útbúgving.

Pinkulítla støddin av føroyska búskapinum avmarkar, hvørji útbúgvingartilboð eru til borgarar í Føroyum. Føroyingar hava møguleika at nema sær kunnleika á hægri stovnum um allan heim bæði við, at stuðul verður veittur til skúlagjald og eisini hevur borgarin møguleika til SU. Tað er ein fyrimunur fyri føroyingar at fara uttanlands at lesa ístaðin fyri at nema sær útbúgving í Føroyum, tí útbúgvingarmøguleikarnir eru størri, førleikin er størri og samskifti við aðrar næmingar úr øðrum londum er stimbrandi.

Tó er neyðugt við hægri lærustovnum í Føroyum til at bjóða fram útbúgvingar, sum ikki fáast aðrastaðni, og fyri at hava eitt granskingarumhvørvi í Føroyum soleiðis, at føroyingar eftir loknað útbúgving kunnu koma heimaftur at granska.

Somuleiðis er tað neyðugt fyri føroyska samleikan at hava læraraútbúgving í Føroyum fyri at styrkja føroyska málið og mentan.

Helst eiga vit eisini at hava eina lógfrøðiliga útbúgving í Føroyum fyri at kenna fólkarættarligu støðu føroyinga, men eisini fyri at hava ein óheftan lærustovn, sum kann viðgera lógfrøðislig ivamál í Føroyum.

Tó skulu hinar útbúgvingarnar veljast eftir gjøllari viðgerð, tí hugsast kann, at føroyingar velja útbúgvingarmøguleikar í Føroyum framum møguleikar uttanlands. Sostatt kann ein ov stórur partur av borgarunum fara undir lestur, sum føroyska samfelagið ikki hevur tørv á.

Internetið hevur viðført størri møguleikar fyri fjarlestri. Hendan skipanin skal útbyggjast og mennast og stuðul til skúlagjald tilskundar næmingum at troyta hendan møguleikan. Tó er vandin, at ung fólk velja hendan møguleikan og fara tí ikki uttanlands at lesa. Næmingar mennast við at koma í universitetsumhvørvi í fremmandum londum. Sostatt skal fjarlestur vera møguligur fyri tilkomin fólk, sum skulu umskúlast heldur enn fyri ung fólk.

Styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar eru væl egnaðar til at tryggja vinnuni starvsfólk við neyvum førleikum á ávísum økjum og stigum. Tó skal havast í huga, at tílíkar útbúgvingar tilskunda borgaran inn í ávísar vinnur, og hann er ikki eins flytførur, sum tey, sum hava bachelor- og master útbúgvingar.

Tær útbúgvingar, sum verða bjóðaðar fram í Føroyum, skulu skipast sum bachelor og kandidatútbúgvingar, soleiðis at tær eru altjóða góðkendar og geva atgongd aðrastaðni. Tað vil siga, at ein bachelorur úr Føroyum kann fara víðari til kandidat uttanlands, samstundis sum viðkomandi kann brúkast breitt í samfelagnum.

Sjúkrarøktrarfrøðiútbúgvingin er nú umskipað til bachelor-útbúgving, og næstum verða læraraútbúgvingin og pedagogútbúgvingin bachelor-útbúgvingar. Maritimu útbúgvingarnar eiga somuleiðis at vera skipaðar eftir sama leisti, har kravið fyri at koma inn er eitt miðnámsprógv, og har útbúgvingin verður skipað sum ein bachelor ella kandidatútbúgving. Búskaparligur førleiki og leiðsluførleiki skal knýtast at hesum útbúgvingum, soleiðis at lærara- og sjómansskúlanæmingar eisini kunnu brúkast í leiðandi størvum aðrastaðni í búskapinum.

Fróðskaparsetrið eigur at virka sum ein savnandi akademiskur lærustovnur, har møguleiki er at fara undir hægri lestur og undir granskingarverkætlanir, og har umstøður vera fyri, at so mong sum gjørligt nema sær eina Ph.D.útbúgving óansæð vinnutilknýti. Fróðskaparsetrið verður viðgjørt serskilt seinni í ritinum undir gransking og menning.

## 2.5 Eftirútbúgving

Førleikakapitalur eru førleiki og evnir hjá starvsfólkum. Samband er millum førleikakapitalin hjá starvsfólki og starvsfólkaproduktivitetin. Um førleikin verður øktur hjá starvsfólki økist produktiviteturin hjá fyritøkuni. Økist produktiviteturin økist búskaparvøksturin. Kanningar vísa, at eitt eyka ár skúlagongd í miðal fyri hvønn einstakan borgara viðførir umleið 6%[13] øking í BTÚ yvir eitt longri tíðarskeið.

Landsstýrið eigur at raðfesta eftirútbúgvingar ovast. Týdningarmikið er at útbúgva okkara ungdóm, og um vit skulu røkka málinum í 2015, er eisini neyðugt, at verandi arbeiðsmegi verður førleikament. Tey tilkomnu, sum í dag mynda okkara arbeiðsmarknað, skulu fáa tilboð um eftirútbúgving skjótast gjørligt.

Arbeiðsleys og ófaklærd starvsfólk omanfyri ein ávísan aldur uttan mun til vinnutilknýti eiga at fáa tilboð um at fara á miðnámsskúla við eftirfylgjandi hægri

---

[13] OECD. (Bassanini and Scarpetta). The New Economy ,s. 71.

lestri við stuðli frá tí almenna. Ófaklærd í hesum sambandinum, eru persónar, sum bert hava prógv frá fólkaskúla ella/og miðnámsskúla.

## 2.6 Vitanarstarvsfólk

Vitanarstarvsfólk eru borgarar, sum kunnu lýsa og finna avbjóðingar og trupulleikar hjá fyritøkuni. Tey duga at hugsa nýtt, taka intiativ og ábyrgd, og eru góð at breiða sína vitan út til onnur. Vitanarstarvsfólkið hevur eisini lært at læra. Dømir um vitanarstarvsfólk eru granskarar, arkitektar, rithøvundar, læknar, verkfrøðingar og búskaparfrøðingar. Hesi hava høga torgreidda vitan. Eitt vitanarstarvsfólk hevur førleika til at taka rættar avgerðir, og tí skal tað eisini hava ábyrgd, sum merkir, at bygnaðurin skal verða liðiligur og ábyrgd og uppgávur skulu vera býttar út.

Búskaparvøkstur krevur ein prúðan skara av starvsfólki við høgum førleika. Ein loysn er at innflyta arbeiðsmegi við góðum førleika, um hon manglar í Føroyum. Í USA var fyri nøkrum fáum árum síðani fjórði hvør KT-arbeiðari fremmandur.

Í vitanarsamfelagnum er tørvur á vitanartungum starvsfólki, men hesin tørvurin er ikki í sama mun í privatu vinnuni í Føroyum í dag. Torført er eitt nú at fáa eyga á akademikarar í fiskivinnuni og alivinnuni. Spurningurin er hví? Í OECD londunum er eftirspurningurin eftir granskarum, verkfrøðingum, KT-serfrøðingum og tøkningum vaksin við 30% í 90unum. Lønin til vitanarstarvsfólk er hækkað nógv skjótari enn fyri aðrar bólkar. Hinvegin er reallønin lækkað hjá vanliga industriarbeiðaranum.[14]

Fyri at skapa vitanarstarvsfólk er týdningarmikið, at fígging verður játtað til útbúgvingar, at føroyingar vera eggjaðir til at nema sær útbúgving, at fjølbroytt útboð er av útbúgvingum, og at útbúgvingin hevur høga góðsku.

[14] OECD. The New Economy, s. 56

Fyri at gagnnýta vitanarstarvsfólk er týdningarmikið, at útbúgvingin er viðkomandi fyri vinnuna, at leiðslan í fyritøkuni er kompetent, soleiðis at hon í fyrsta lagi setir vitanarstarvsfólk í starv og í øðrum lagi dugir at brúka vitanarstarvsfólk.

Eftirspurningurin eftir vitanarstarvsfólkum skal økjast í privatu vinnuni. Í dag vera ikki nóg nógvir akademikarar settir í starv í privatu vinnuni. Ein orsøk er allarhelst hon, at fyritøkurnar í Føroyum fyri tað mesta eru smáar fyritøkur, sum – eins og í øðrum londum - ikki seta akademikarar í starv. Ein onnur orsøk er, at leiðsluførleikin í privatu vinnuni kanska er ov lágur, og leiðslan sær sostatt ikki ágóðan av at hava høgt lært fólk í starvi. Leiðslan sær bert tær høgu lønar-útreiðslurnar av einum akademikara og sær ikki, at høga lønin er ein íløga í framtíðina, har fyritøkan verður meira produktiv. Ein triðja orsøk kann vera umdømið, sum høgt lærd fólk hava í Føroyum.

Tað almenna kann ikki gera nakað við tann lága førleikan hjá leiðslunum í føroyskum fyritøkum, tí íleggjarin avger, hvør leiðslan er. Men tað almenna kann skapa karmar, sum viðføra fría, harða og virkna kapping. Við henni verða fyritøkur trýstar til at seta sær rætt fólk í starv fyri at klára seg í kappingini. Ein annar møguleiki er at bjóða fyritøkum í Føroyum at seta ein akademikara í starv, har tað almenna rindar t.d. helvtina av lønini í eitt tíðarskeið.

## 2.7 Lívslong læra

Fyri at møta einum vónandi komandi eftirspurningi eftir vitanarstarvsfólki er neyðugt at styrkja orkuna til at økja førleikan. Landsstýrið eigur tí at tryggja, at útbúgvingarskipanin kann tillaga seg økta eftirspurningin. Ein ætlan fyri lívslanga læru er sera átrokandi.

Fyri at menna verandi arbeiðsmegi er neyðugt at menna nýggjar vinarligar útbúgvingar. Í USA er næstan helvtin av teimum lesandi tilkomin fólk, tí skipanin er liðilig. T.d. er møguligt at lesa part-time, sum fjarlestur ella í vikuskiftum. Í

Danmark eru undir 3% av teimum lesandi yvir 35 ár, meðan í Bretlandi er talið omanfyri 8%, og í Australia er talið 12%.

Fólk skulu verða eggjað at taka útbúgvingar, sum eru góðkendar á arbeiðsmarknaðinum, og sum gevur teimum flytføri og arbeiðsmøguleikar. Sostatt skulu tey verða eggjað til at fara inn í tær traditionellu útbúgvingarnar.

Virkir verða heldur ikki eggjaði til at førleikamenn starvsfólki. Ein orsøk kann vera, at virkisleiðslir bera ótta fyri, at arbeiðstakarin flytir í annað starv, tá ið hann hevur fingið útbúgvingina, og tí vilja tær ikki fíggja tílíka førleikamenning. Virkir vilja heldur royna at taka góð fólk frá øðrum virkjum.

Ein møguleiki er at geva fyritøkum møguleika til at bóka førleikamenning, sum eitt aktiv. Ella at møguleiki er at geva tilskot til at avskriva førleikan hjá starvsfólki á sama hátt, sum vanlig aktivir vera avskrivað. Hetta krevur, at reglurnar fyri bókhald skulu broytast.

Hvør einstakur borgari veit best sjálvur, hvat hann ynskir at lesa. Sostatt skal hann hava frælsi at velja. Fyri at eggja tilkomnum starvsfólki og fyritøkum til førleikamenning er tó ein møguleiki, at kostnaðurin verður borðin av starvsfólkinum, arbeiðsgevarinum og tí almenna í felag – t.d. ein triðing í part. Hetta er ein háttur at økja um íløguna í øktan førleika hjá føroyingum og flytføri av arbeiðsmegini. Hetta er týdningarmikið fyri ta arbeiðsmegi, sum í dag myndar arbeiðsmarknaðin og sum fyri ein part ikki er før fyri at flyta Føroyar inn í vitanarsamfelagið.

## 2.8 Marginalskattur ein forðing

Tilskundanin til at taka hægri útbúgving er ein trupulleiki, tí við tí høga marginalskattinum og lítlu lønarspjaðingini í samfelagnum, gevur útbúgvingin ikki nóg stóran lønarvøkstur til borgaran. Tað kann eisini tilskunda borgarar at fara í onnur lond, har skatturin er lægri, at arbeiða. Eisini kunnu tey velja at arbeiða minni og fáa sær størri frítíð vegna marginalskattin.

Høgtlærd fólk kunnu verða tilskundað at arbeiða í Føroyum, um marginalskatturin er lægri. Í USA fær eitt starvsfólk ikki hægsta skatt, fyrr enn tað vinnur 12 ferðirnar lønina hjá einum vanligum arbeiðara.

## 2.9 Tilmæli

Mælt verður til, at so fáir fólkaskúlar sum til ber vera í Føroyum. Serliga frá sætta flokki, skulu skúlarnir vera fáir, meðan smáu bygdaskúlarnir kunnu varðveitast til at húsa fyrsta til fimta flokk.

Mælt verður til, at miðalkarakterir fyri allar fólkaskúlar í Føroyum vera almanna-kunngjørdir fyri at geva skúlunum eina tilskundan um betran.

Mælt verður til, at allir fólkaskúlalærarar, sum undirvísa frá sætta flokki og hægri, skulu hava kandidatútbúgving. Tí eigur lærararútbúgvingin at verða longd við einum ári, so prógvið verður eitt kandidatprógv, sum eisini rúmar leiðsluførleika, soleiðis at lærarar kunnu brúkast aðrastaðni á arbeiðsmarknaðinum.

Mælt verður til, at KT verður tvungin lærugrein á læraraskúlanum, soleiðis at lærarar hava høgan førleika innan KST-nýtslu.

Mælt verður til, at lærarar, sum eru í starvi í dag, skulu sum treyt taka eftirútbúgving á læraraskúlanum fyri at fáa status sum kandidatar. Í hesari eftirútbúgving skal KT-førleikin hjá hesum lærarum mennast.

Mælt verður til, at leiðslan á fólka- og miðnámsskúlunum verður myndað við fólki, sum hava leiðsluførleika frá hægri lærustovni.

Mælt verður til, at kravt verður, at øll undirvísing fer fram elektroniskt frá áttanda flokki, har hvør næmingur skal hava farteldu, og skúlin skal hava tráðleyst net, har allar uppgávur vera gjørdar elektroniskt og avleveraðar elektroniskt. Alt

undirvísingartilfar umframt lærubøkur skal vera elektroniskt. Øll skulu í áttanda flokki læra blindskrift.

Mælt verður til, at bæði almennar og privatar fyritøkur kunnu veita sínum starvsfólkum fría farteldu og breiðband og internetnýtslu heima við hús, uttan at starvsfólkini verða skattað av hesum.

Mælt verður til, at miðjað verður ímóti, at allir tannáringar eftir loknan fólkaskúla fara á miðnámsskúla ella í læru. Samstundis skal viftan av møguleikum hjá ungum vera so breið, at tað eisini verður møguligt hjá teimum minni bókligu næmingunum at nema sær eina útbúgving.

Mælt verður til, at øll lærlingaprógv og miðnámsprógv skulu geva atgongd til hægri lestur.

Mælt verður til, at miðnámsskúlar skulu miðsavnast soleiðis, at útboðið av greinum verður so fjølbroytt sum til ber, og góðskan á skúlanum verður so høg sum til ber.  Mælt verður til, at tveir miðnámsskúlar vera - ein á Kambsdali og ein í Marknagili í Tórshavn.

Mælt verður til at útbyggja fysisku karmarnar fyri hesar miðnámsskúlar soleiðis, at teir nøkta tørvin á útbúgvingum.

Mælt verður til, at eittans miðnámsprógv skal vera, har næmingar kunnu velja sær sergreinir eftir tørvi.

Miðnámsskúlar skulu eftirkannast, og mælt verður til at samanbera góðskuna av miðnámsskúlunum í Føroyum við skúlar í øðrum londum.

Mælt verður til, at íverksetaramenning verður tvungin partur av undirvísingini á miðnámsskúlum.

Mælt verður til, at allir miðnámsskúlanæmingar fáa útbúgvingarstuðul.

Mælt verður til, at næmingar eftir loknað miðnámsútbúgving, skulu eggjast at fara á víðari lestur beinanvegin við øktum stuðli fyrsta ári og avdráttarfríum láni, um næmingurin fer beinanvegin og megnar at gjøgnumføra útbúgvingina normeraða tíð. Hetta fyri at fáa miðalaldurin niður á teimum lesandi og at minka um talið á lesandi, sum fáa sær eitt hvíldarár ímillum miðnám og hægri lestur.

Mælt verður til, at allir føroyskir borgarar eldri enn 35 ár, sum ikki hava hægri útbúgving enn fólka- og miðnámsskúla, fáa bjóða almennan stuðul til at fara á miðnámsskúla ella á hægri skúla. Miðnámsútbúgvingin fyri hesar næmingar kann gerast smidligari og meira beinrakin soleiðis, at tey kunnu koma skjótari ígjøgnum miðnámið.

Mælt verður til, at allar hægri útbúgvingar í Føroyum vera skipaðar sum bachelor og master útbúgvingar, og at møguligar blindgøtur verða lúkaðar úr skipanini.

Mælt verður til, at maritimu útbúgvingarnar verða skipaðar sum bachelor- og kanditatútbúgvingar, har leiðsluførleiki verður knýttur afturat undirvísingini, soleiðis at hesir næmingar eftir lokið prógv kunnu brúkast breitt í samfelagnum.



## 3. Keldur

Búskaparráðið. Tøknilig menning og vælferð. August 2005

CBS. Hvad skal Danmark leve af?, Adrian Nygaard Lema. 2004

Dansk Industri. Erhvervspolitik til tiden. Januar 2005
Dansk Industri. Regeringsgrundlag 2005 – nye mål.

Det Økonomiske Råd. Dansk Økonomi efterår 2003
Det Økonomiske Råd. Dansk Økonomi forår 2003

Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur. Grein: Biotøkni; møguleikar og avbjóðingar sæð úr einum føroyskum sjónarhorni

FORA. Et benchmarkstudie af innovation og innovationspolitik. September 2003
FORA. Et benchmarkstudie af menneskelige ressourcer. Oktober 2004
FORA. Innovationsmonitor. August 2004

Føroya Lærarafelag. Rálegging Fólkaskúlan 2004/2005.

Fróðskaparsetur Føroya. Menningarætlan 2001 – 2004.
Fróðskaparsetur Føroya. Røða hildin av Hermanni Oskarssyni á fundi í umboðs-nevnd Fróðskaparsetur Føroya
Fróðskapasetur Føroya. Fundur við Jóhan Paula Joensen, Anniku Sólvará og Jákup Sørensen.

Fundur við Boga Hansen, Knut Simonsen og Hjalta í Jákupsstovu

Granskingarráðið. Samrøða við Rúnu Hilduberg.

MMR. Álit um útbúgvingar innan fiskivinnuna. 2001
MMR. Fundur við Petur Petersen, Olaus Jespersen, Eyðbjørn Poulsen og Jóannes Dalsgaard
MMR. Til menning og mátt – kunningartøkni í ungdóms- og framhaldsútbúgvingum. 2001
MMR. Útbúgvingarpolitikknevndin. Føroyskur førleiki. 1999

Nordisk ministerråd. Norden som global vinderregion. 2005

OECD. Education at a Glance. 2005
OECD. Science, Technology and Industry: Scoreboard 2005
OECD. The New Economy Beyond the Hype. 2001

Ólavur Gregersen, arbeiðsskjal

SHEY. Samrøða við Sámal í Skorðini, rektara

Tænketanken. Fremtidens vækst. Det nytænkende og fleksible samfund. Maj 2005

VMR. Frágreiðing og tilmæli í sambandi við granskarapark. Juli 2005